# SKRÁSETING FØROYA

FELAGSSKRÁSETING
Box 264 - FO-110 Tórshavn - Tlf. +298 35 60 10 - Fax +298 35 60 15 - E-mail skr@skraseting.fo – www.skraseting.fo

24. november 2014

**Útboð viðvíkjandi eftirliti við ársfrásagnum**

Skráseting Føroya fer hervið at biðja tykkara virki um tilboð uppá arbeiði at gera eftirlit við 100 innkomnum ársfrásagnum fyri roknskaparárið 2013.

Skráseting Føroya hevur eftirlit við innkomnum ársfrásagnum sambært ársroknskaparlógini kap. 21. Arbeiðið var á fyrsta sinni útbjóðað í 2013. Tá vann P/F Januar útbjóðingina.

Ætlanin er, at 3-4% av innkomnum ársfrásagnum skulu til eftirlit. Talan er um 100 ársfrásagnir fyri roknskaparárið 2013. Skráseting Føroya velur sjálvt hvørjar ársfrásagnir talan er um.

<u>Arbeiðið</u>

Arbeiðið er, at kanna um:

Ársfrásøgnin lýkur krøvini í ársroknskaparlógini, løgtingslóg um bókhald, vinnufelagslógini, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnurekandi virkir og grannskoðaralógini. Er ársfrásøgnin gjørd eftir altjóða roknskaparásetingum jfr. § 137, skal kannast um ársfrásøgnin er gjørd sambært hesum ásetingum (standardum).

<u>Útboð</u>

Skráseting Føroya hevur valt at koyra í útboð uppgávuna fyri ársroknskaparárið 2013. Hátturin er gjørdur í samsvar við rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 1. oktober 2013, rundskriv um keyp av vørum og tænastum.

Viðvíkjandi treytum til tænastuna:

1) Arbeiðið skal gerast av skrásettum ella løggildum grannskoðara
2) Arbeiðið skal gerast við støði í ársroknskaparlógini kap 21. Kanningararbeiðið snýr seg um at kanna móttiknar ársfrásagnir og møguligar váttanir frá grannskoðara og um hesar uppfylla treytirnar í galdandi lóggávu.
3) Grannskoðarin skal lata Skráseting Føroya eitt upprit við manglum í kannaðu ársfrásagninum, sum vísa til brot á lóggávu ella standardum.
4) Skrásting Føroya er skrivstova fyri tann, sum ger arbeiðið og er fólk avsett hesum viðvíkjandi. Grannskoðarin skal ráðgeva í málsviðgerðini.

Mett verður, at hvør ársfrásøgn tekur 2 tímar at kanna (í meðal).

Tikið verður av lægsta tilboð.

Innlatingarfreist

Tilboðini skulu sendast til kme@skraseting.fo. Spurningar freistin er 5. desember 2014. Innlatingarfreistin er 15. desember 2014 og vinnarin verður kunngjørdur tann 18. desember 2014.

Um tit hava spurningar, eru tit vælkomin at venda tygum til Kitty May Ellefsen á kme@skraseting.fo